# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

P/F Postverk Føroya:

## Dánjal Pauli settur sum marknaðar- og sølustjóri



**TÍÐINDASKRIV**

P/F Postverk Føroya hevur sett nýggjan marknaðar- og sølustjóra í starv.

Dánial Pauli Davidsen er settur í starv sum marknaðar- og sølustjóri í P/F Postverk Føroya. Dánial Pauli er 41 ára gamal og havnarmaður. Hann hevur tikið cand. merc. prógv á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn í 1990.

Dánial Pauli hevur, síðan hann var liðugur við útbúgving sína, arbeitt í Danmark innan leiðslu, marknaðarføring, umsiting, menning og búskap.

Dánial Pauli tekur við starvinum frá 1. januar 2007 at rokna.

P/F Postverk Føroya gleðir seg til samstarvið við Dánial Paula. Við hesi starvssetan fer nýggja partafelagið undir eitt nýtt kapittul í vinnuvirksemi sínum til gleði fyri viðskifta-, starvsfólk, eigarar og onnur, ið varða av P/F Postverk Føroya.

B'chic salong:

## Nýggj frisørsalong á Ternuryggi

**Mánadagin 6. november letur ein nýgg frisørsalong upp á Ternuryggi í Havn. Talan er um salongina »b'chic salong« sum Irena Bech hevur sett á stovn**

**HÁRFRÍÐKAN**

Í hesum sambandi verður móttøka leygardagin 4. november frá kl. 15-18 í nýinnrættaðu hølunum hjá »b'chic salong« á Sundsvegi 20. b'chic merkir: at verða smartur ella fiksur. Salongin er í sama bygningi sum Ternubúðin.

Irena er útbúgvin frisør. Hon lærdu hjá salong Tótu og var útlærd í 2000. Síðan hevur hon arbeitt sum frisør, bæði í Keypmannahavn og í Havn.

Irena sigur, at »b'chic salong« er einasta salong í grannalagnum, og hon leggur stóran dent á at kundarnir fáa eina góða tænastu í hugnaligum umhvørvi. Til dømis vaskar hon hár við massagu til kropp og hárbotn.

Saman við frisørvirkseminum selur hon eisini produktini: Alterna, Tigi og American Crew. Alterna fæst einans hjá tveimum frisørum í Klaksvík og hjá "b'chic salong" í Havn. Alterna er eitt produkt, sum verður nýtt av nógvum kendum persónum er sera væl dámt í Danmark, sigur Irena, og leggur afturat at hon frá 6.-11. november hevur nøkur sera góð upplatingartilboð. »b'chic salong« hevur telefon 318 318.



*Irena Bech frá »b'chic salong«. Leygardagin 4. november verður móttøka, og mánadagin 6. november letur salongin upp*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Stór mótaframsýning á Skúlaheiminum



**Leygdarkvøldið 4. november verður ein stór mótaframsýning við nýggjasta hár, make-up og klædnamótanum á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin í Havn**

**FRAMSÝNING**

Ein stór mótaframsýning verður í kantinuni á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin leygarkvøldið 4. november.

Tað eru 3. árs frisørlærlingar á Teksniska Skúlanum í Tórshavn, sum skipa fyri tiltakinum, sum er til frama fyri eina nánsmferð hjá flokkinum til London í mars mánað.

Eisini verður powerpoint framløga við nýggjasta hármótanum frá London. Hárproduktini frá TIGI, sum verða sýnd fram, eru: S-factor, Bed Head og Catwalk.




*Fyrireikarar til mótaframsýningina Kristin Bjørk og Ann L.Henriksen, frisørlærlingar*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Handlarnir, sum sýna fram vera: Siri, Diva, Handilskjarnin (harradeildin), Júniik, Kjallarin, Eitems, Sirri, Touché, og Mótaskálin. Frásøgumaður verður Jákup Jacobsen.

Talan er um eitt rættuliga stórt tiltak, og tveir av fyrireikarunum, Kristin Bjørk og Ann L.Henriksen, frisørlærlingar, siga, at tær vænta nógv fólk. Atgongumerki á 50 krónur fáast við dyrnar.

